## Nubira 1.8 CDX



Nýggi Daewoo Nubira er nú komin í útgávuni 1,8 CDX við 122 hk, ið er betri útgjørdur við t.d. klimaanleggi, fínari interiøri, og fløguspælara við box til 6 fløgur. Bilurin verður seldur til sera kappingarførar prísir, verður upplýst

*Kelda: P/F Esmar Simonsen*

## Getz mest økonomiskur



Ein analysa av 20 teimum mest seldu bilunum í Danmark í fjør vísti, at Hyundai Getz 1,3 var tann mest økonomiski bilurin at eiga, um bileigarin t.d. hevur bilin í fýra ár og koyrir 20.000 km um árið

*Kelda: www.bilpriser.dk*

## Fiat Idea í februar



Ein heilt nýggjur bilur, Fiat Idea, er júst nú er komin út til donsku bilhandlararnar. Bilurin er í sama klassa sum t.d. Opel Mevira og Toyota Yaris Verso. Fiat Idea, sum fæst bæði sum bensin og diesel, væntast til landið fyrst í februar

*Kelda: Bilfríðkan*




*Pylsubilurin hevur reklamur frá fleiri ymiskum fyritøkum og feløgum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Pylsukongurin, Mourits Clementsen:

# Pylsukongurin vitjar í miðbýnum

**20 ára gamli Mourits Clementsen í Hoyvík hevur keypt sær ein Citroën Jumper, ið er uppbygdur sum pylsubilur. Mourits passar børn í frítíðarskúlanum í Hoyvíkar Skúla og selur pylsur í miðbýnum í vikuskiftinum**

PYLSUBILUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

So gott sum hvørt vikuskifti fær miðbýurin í Havn vitjan av pylsukonginum Mourits Clementsen, sum rekur Fa. Pylsukongurin.

Vanliga setur hann pylsubilin í gongugøtuni frá á midnátt til kl.5 á morgni. Eisini hevur hann ætlanir um at seta bilin í Gundadali tá fótbóltskappingin byrjar aftur og at fara til bygdastevnurnar kring landið um summarið. Pylsubilurin stendur t.d. eisini við Badmintonhøllina tá DJ Show og onnur líknandi tiltøk fyri ungfólk eru.

Bilurin er ein Citroën Jumper 2,5 HDi við 107 hk, sum frá nýggjum av er uppbygdur sum pylsuvognur. Hann er innrættaður við øllum, sum hoyrir til ein nútímans pylsuvogn, sum t.d. kókiamboðum, steikiplátum, breyðovni, frystiboks og køliskápi. Bilurin er góðkendur av heilsumyndugleikunum.




*Pylsukongurin Mourits Clementsen við pylsubilinum í miðbýnum í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Mourits selur pylsur, toast og vanligar kioskvørur. Eisini selur hann "Frælsi í dós" og teletíðarkort frá Kall. Hann hevur eina toastmaskinu, sum ger vanlig toast - ikki í mikroovni - tey smakka sera væl og vera væl móttikin. Mourits sigur, at hann eisini hevur tær bestu pylsurnar í býnum.

### Pláss til reklamur

Uttan á bilinum eru fleiri reklamur hjá ymiskum fyritøkum, sum tekna seg fyri at gjalda fyri eitt ella tvey ár á gangin. Mourits sigur, at hann selur flestu av vørunum, sum hann reklamerar fyri í pylsuvogninum. Men enn er pláss til nakrar reklamur afturat. Fleiri av núverandi reklamunum verða skiftar út, tí tær eru gjørdar við fyrrverandi eigaran av bilinum. Fyritøkur og feløg sum kundu hugsað sær at havt reklamur á bilinum kunnu senda teldupost til:
pylsukongurin@kallnet.fo

Fremst á bilinum er ein útbygdur kassi við einum bensinmotori, sum er eitt streymagrigat, tá Mourits selur pylsur, har eingin streymveiting er.

Mourits er sonur Lív og Hans Clementsen í Hoyvík, hann eigur systrarnar Guðrun og Bjørg. Hann sigur, at um familjan ikki hevði stuðla og hjálpt honum so væl, hevði tað ikki borið seg fíggjarliga hjá honum. Tað er altíð tungt at byrja. Eisini hava vinirnir verið góðir at heita á og at geva eina hjálpandi hond tá á stendur, sigur pylsukongurin, Mourits Clementsen.

Sjálvur pylsuvognurin er rættuliga stórur, kassin er 4,5 m langur, 2,2 m breiður og 2,2 m høgur. Mouritsi dámar hetta arbeiði sera væl, hann møtir nógvum ymiskum fólkum í býnum í vikuskiftinum.

Bilurin bleiv keyptur nýggjur frá Ivan Johansen Bilum í 2001. Mourits Clementsen keypti bilin sum tvey ára gamlan í 2003.



*Guðrun Clementsen til arbeiðis í pylsubilinum. Umframt pylsur og toast selja tey eisini vanliga kioskvørur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**




**FORD FOCUS STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg 16.maj 2002, Km 41.000. Sum nýggjur: - Centrallás- El.Rútar-Hita í forrúti - Hita í Forsetrum - Radio v/bandsp. v.m. Bert 1.ár og 5. mánaðir. Seldur vegna keyp av 7. pers. Bili. Kr. 175.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mar-97, Km 152.000. Fjarstýrt centrallás-, El-rútar-, El-spegl-, spoylara aftan, alufelgur v.m. Tilboð uttan bil í býti kr. 56.000. Kr. 66.000.



**TOYOTA LANDCRUISER DIESEL**
Árg Maj 1986, Km 136.000. Innregistreraður sum persónvognur. Leverast nýsýnaður. Kr. 30.000.



**TOYOTA CARINA 1.8 GLX SEDAN**
Árg Dec. 1997, Km 111.000. Aircondition, alufelgur, eyka hjólsett, el-rútar fr., radio v/C.D., centrallás v.m. Sera vælhildin. Kr. 96.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Sera vælhildin: Automatisk gear, centrallás, el-rútar, el-spegl, radio v/bandspælara. Kr. 78.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 10.April 96, Km 70.000. Sera vælhildin: Automatisk gear -C.D.Anlegg - Centrallás - El. Rútar - El. Spegl v.m. Kr. 85.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Sera vælhildin: Aircondition, alufelgur, fjarstýrt centrallás, el-rútar, el-spegl v/hita. C.D. Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 158.000.



**HONDA CIVIC**
Árg Sept. 2001, Km 20.700. Aircondition, el-rútar, el.spegl v/hita, radio, fjarstýrt centrallás v.m. Sum nýggjur. Tilboð kr. 135.000.



**JKIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg 17 Jan. 1997, Km 49.000. Fjarstýrt centrallás, el-rútar, el-spegl, radio v/bandspælara eyka tectylviðgjørdur. Selist vegna flyting til Danmark. Kr. 58.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL**
Árg 03 Marts 1993, Km 82.000. Sera vælhildin: El-sóltak, centrallás, el-rútar, el-spegl, radio v/bandspælara, eyka hjólsett v/píkum. Kr. 67.000.

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**



**FORD ESCORT**
Árg. okt.97, Km 102.000. Kr. 65.000 Sýnaður 19.09.03.



**FORD MONDEO 1.8 D**
Árg. feb. 95, Km 151.000. Kr. 69.000 Sýnaður 10.07.01.



**VOLVO 850**
Árg. apr. 95, Km 116.000. Kr. 114.000. Sýnaður 12.02.03.



**HONDA ACCORD 2.0I LS**
Árg. okt. 00, Km 39.000. Kr. 165.000.



**VOLVO V70 - 2.4**
Árg. okt.02, Km 19.000. Kr. 335.000. Sera væl útgjørdur.: Innbygda telefon, HI-performance ljóðanlegg við 9 hátalarum.



**HONDA ACCORD 1.8**
Árg. apr. 98, Km 87.000. Kr. 95.000. Sýnaður 06.06.02.



**VOLVO S40 1.8**
Árg. mei. 97, Km 94.000. Kr. 119.000. Sýnaður 13.03.03.



**TOYOTA COROLLA 1.6 S/D**
Árg. mei. 99, Km 60.000. Kr. 95.000. Sýnaður 10.09.03.



**OPEL ASTRA 1.7 TD**
Árg. apr. 97, Km 175.000. Kr. 59.000. Sýnaður 10.03.

VOLVO RENAULT

VR BILAR

Hoyvíksvegur
tel 322110



**SKODA FABIA 1,2 MPI**
Árg mai 2003, Km 5.600. Bilurin er bert 8 mánaðir gamal, sera vælhildin og lítið brúktur.
Kr. 105.000.
**Tel. 216135**






HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Hósdagin 22.01. kl. 20[30]
Hósdagin 22.01. kl. 22[45]




Hósdagin 22.01. kl. 22[15]




Hósdagin 22.01. kl. 18[00]




**Biletprísur: 65,- kr.**
Hósdagin 22.01. kl. 18[30]
*– Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
**Fríggjadagin 23.01.**